# Nú skal brúkarin í Føroyum verjast betur

**Á næsta løgtingsfundi, sum verður mitt í januar, fer javnaðarflokkurin at leggja eitt umfatandi uppskot fyri tingið um brúkaravernd**

BRÚKARAVERND
*Áki Bertholdsen*

– Tað hevur leingi verið greitt, at áhugamálini hjá brúkarunum eru sera illa vard í Føroyum. Eru trupulleikar, stendur brúkarin bæði ráðaleysur og verjuleysur. Tað finst ongin almennur brúkarapolitikkur, tað er ongin skipað brúkarakunning, og heldur ein brúkari seg hava verið fyri órætti, hevur hann ongastaðni at leita sær hjálp, uttan at fara í rættin og tað er í flestu førum alt ov trupult, drúgt og kostnaðarmikið.



*Vanligi brúkarin í Førooyum er alt ov illa vardur, heldur javnaðarflokkurin. Tí fer flokkurin nú at leggja uppskot fyri tingið um at seta brúkarastovn á stovn. Samstundis verður skotið upp at seta ein kærunevnd fyri brúkarar á stovn og eina lóg um marknaðarføring*

*Savnsmynd*

Hetta er orsøkin til, at javnaðarflokkurin nú tekur stig til at seta lógir í gildi, sum skulu tryggja brúkaran.

Hans Pauli Strøm í javnaðarflokkinum, sigur, at flokkurin heldur at í dagsins brúkarasamfelag hava brúkaraáhugamál so stóran samfelagsligan týdning, at tað er sjálvsagt at tey eru eitt politiskt ábyrgdarøki og tí skjýtur hann upp at seta ein almennan brúkarastovn á stovn.

Tá ið Løgtingið kemur saman aftur til fundar í nýggja árinum, fer javnaðarflokkurin tí at leggja uppskot fram um um at seta ein brúkarastovn á stovn.

Hesin stovnur skal bæði hýsa einum brúkaraumboði og einum kærustovni.

Brúkaraumboðið skal verða stjóri fyri stovnin. Afturat sær skal hann hava eina brúkaranevnd við líka nógvum umboðum fyri brúkaran og vinnuna.

Hendan nevndin skal hava eftirlitið við eini lóg um marknaðarføring, sum javnaðarflokkurin eisini skjýtur upp at samstykkja. Hendan lógin skal seta reglar fyri, hvussu vinnurekandi kunnu bjóða vørur og tænastur fram.

Samstundis skal ein kærunevnd setast, sum brúkarar kunnu venda sær til, halda teir seg hava verið fyri órætti, tá ið teir hava keypt vørur ella tænastur.

### Ongin villleiðing

Í uppskotinum um marknaðarføring, skjýtur javnaðarflokkurin m.a. upp, at vinnurekandi skulu ikki hava loyvi til at geva skeivar, villeiðandi ella órímiliga óneyvar upplýsingar, sum kunnu ávirka eftirspurningin ella útboðið.

Tað er eisini villeiðandi og ólógligt at geva brúkarum váttan um garanti ella aðra trygdartilsøgn, um keyparin við hesi tilsøgn ikki fær eina munandi betri rættarstøðu enn hana, sum longu hevst sambært galdandi lóggávu.

Fyri at selja vørur og tænastur, hava vinnurekandi ikki loyvi til at fjarsamskifta beinleiðis við fólk, sum hava fráboðað, at tey ikki vilja hava slíkt samskifti. Fjarsamskifti fevnir um eitthvørt slag av telesamskifti og annað samskifti.

### Lóg um Brúkarakærunevnd

Umframt eina lóg um marknaðarføring, verður skotið upp at gera lóg um eina brúkarakærunevnd at viðgera kærur frá brúkarunum í dagligum viðurskiftum í sambandi við keyp og sølu av vørum og tænastum og øðrum avtalum.

Nevndin skal virka óheft av landsstýrinum og skal taka avgerðir á so tryggum grundarlagi, at avgerðirnar í mest møguligan mun koma at liggja uppat tí, ein rættaravgerð hevði komið til.

Lagt verður politiskt upp til, at vinnan sjálv loysir trætumál síni við brúkararnar, og verður tí í lógini eisini latið upp fyri, at aðrar kærunevndir við somu heimild kunnu setast, um tær eru góðkendar sum slíkar sambært lógini.

– Við hesum verður skundað undir, at vinnubólkar sjálvir gera kærunevndir innan teirra øki, teimum sjálvum og brúkarunum at gagni, sigur javnaðarflokkurin

## Halda nýggjár sum tað sømir seg

Tað er ymiskt, hvat verður gjørt burturúr ymsum døgum í ymsum bygdum. Sumba er føstulávintsbygd burturav og Vágur hevur verið serliga kend fyri nýggjárhaldið

Men nú eru tvørafólk eisini komin upp í part og Tvøroyri er eisini blivin ein rættilig nýggjársbygd.

Í nøkur ár hevur verið skipað fyri nýggjárshaldið á Tvøroyri og tað vindur meiri og meiri upp á seg og í ár verður tað stórfingnari enn nakrantíð.

Tað er ein virkin nýggjársnevnd, sum savnar pening saman til nýggjárshaldið við ymsum tiltøkum ígjøgnum árið.

Oddur Dimon, ein av undangongumonunum, sigur, at í ár verður skrúðgonga úr "Oldurdalinum" út í skúlan í Trongisvági kl. 23.45, har stórt bál verður á plássinum frammanfyri skúlan.

Á midnátt verður fýrverk skotið og tað er fýrverk, sum sigur spaðarfrúgv til alt, teir hava havt frammanundan.

Oddur Dimon sigur, at í ár hava teir fingið rakettir úr Spania, sum eru fleiri ferðir stórfingnari enn tær, teir plaga at hava. Hann sigur, at onkrar av rakettunum hava eina spreinging uppá fimm ferkilometrar uppi í luftini, so tað er ikki smávegis.

Klokkan eitt byrjar dansurin inni í ítróttarhøllini, har "Ein blanding" fer at spæla við tveimum gestasangarum norðaneftir, tað eru tvær gentur, sum eita Durith og Heidi.

Tá verður eisini ókeypis sodavatn til børnini, sjampanja til tey vaksnu og breyð til øll.

## Sjavskapping í Sandvík

Sunnukvøldið verður skipað fyri sjavskapping í Ranhøll í Sandvík. Kappingin byrjar klokkan seks, men tað er ikki neyðugt at melda til frammanundan.

Sjavskapping hevur verið í Sandvík í fleiri ár nú ímillum jól og nýggjár og tað plaga at verða rættiliga fitt av fólki, eini 30, ella gott tað, hvørja ferð.

Tey flestu hava verið úr norðara parti í Suðuroynni, men fólk hava eisini verið sunnan av oyggj til eina stuttliga løtu í bygdarhúsinum í Sandvík.

Fyrireikararnir siga, at í ár fara tey at skipa spælið øðrvísi fyri at gera tað meiri spennandi, eitt nú skulu øll spæla ímóti øllum.

Tað kostar 20 krónur fyri hvønn luttakara at vera við.

# Fingu 10 tilboð upp á Trónd og Pride

**Tróndur verður seldur til Karibia, men Pride verður seldur í Føroyum**

Strandferðslan er nú loksins sloppin av við tey bæði gomlu Strandfaraskipini, Trónd og Pride, sum hava verið henni ein kleppur um beinið leingi og sum hava ligið í Vestmanna.

Strandferðslan hevur fingið 10 tilboð uppá bæði skipini, níggju tilboð eru úr Føroyum og eitt er uttanlands.

Reidar Nònfjall, stjóri á Strandferðsluni, segði hóskvøldið, at væntandi vórðu keypssáttmálarnir gjørdir í gjár, men tað var ikki greitt, tá ið blaðið fór til prentingar.

Tað var rættiliga stórur munur á tilboðunum, men tey verða seld hægstbjóðandi. Hægsta tilboðið upp á Pride er upp á 155.000 krónur og tað er úr Føroyum.

Hægsta tilboðið upp á Trónd er uppá 640.000 krónur og tað er úr Karibia.

Strandferðslan hevur lagt bæði skipini, Pride varð lagdur í fjør og tróndur í heyt, tí tey kunnu ikki brúkast uttan munandi ábøtur.

Tróndur er smíðaður í Aukra í Noregi í 1959 og nevndist Smøla, tá ið hann varð keyptur til Føroya í 1967. Pride varð bygdur í Florø í Noregi í 1961.

Bæði skipini hava áður verið lýst leys, men tá komu ongi tilboð inn.

Tað verður ein lætti hjá strandferðsluni at sleppa av við tey, tí tað kostar stovninum 500.000 krónur um árið at hava tey liggjandi.



# Nøgdur við fíggjarlógina

**Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, er nøgdur við ta løgtingsfíggjarlóg, sum samtykt varð beint fyri jól. Hann fekk mestsum alt sítt ígjøgnum, sigur hann**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*



*Karsten Hansen, landstýrismaður við fíggjarmálum, er liðugur við sína seinastu fíggjarlóg í hesum valskeiðnum*

Við onkrum smávegis broytingum, varð fíggjarlógin samtykt, soleiðis, sum landstýrismaðurin við fíggjarmálum vildi hava hana. Hann er stórt sæð nøgdur við úrslitið, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann kundi væl hugsað sær eina fíggjarlóg, sum var eitt sindur lægri. Tað er altíð stuttligari at gava lágar útreiðslur, sigur hann.

Men alt í alt er hann nøgdur við, at dýru broytingaruppskotini, sum serliga komu frá andstøðuni, ikki vórðu samtykt.

– Tað, sum varð endaliga samtykt, var í høvuðsheitum tað, eg lat Fíggjarnevndini, sigur hann.

Sjálvandi vórðu onkrar smávegis broytingar gjørdar undir fígjarnevndarviðgerðini, Men tað vil altíð vera so, og tað, sum broytt varð, var gjørt við samtykt frá samgonguni, sigur Karsten Hansen.

### Valár

Hóast hendan fíggjarlógin er tann seinasta í hesum valskeiðnum, er hon ikki merkt av, at valár verður komandi ár, sigur Karsten Hansen.

Hann fegnast um, at tað í grundini komu færri dýr broytingaruppskot, enn fryktandi kundi verið fyri.

Men sjálvandi eru stórar upphæddir at síggja kortini, tí Løgtingið hevur samtykt ávísar rættiliga stórar íløgur, sum gerast skulu komandi árini.

Serliga er tað nýggi Smyril, sum sæst afftur, sigur Karsten Hansen. Hann fer at fáa einar 85-90 milliónir á fíggjarlógini komandi árini, og tað merkist sjálvandi.

Og so er tað undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfjørð, sum eisini komandi árini fer at merkjast, um enn ikki beinanveg.

Ein annar stóru postur er Landsjúkrahúsið, ið eins og skúlin eisini hevur fingið meira pening, enn frammanundan.

– Tað eru gjørdar ávísar raðfestingar, sum eru sjónskar, sigur Karsten Hansen, landstýrismaður við fíggjarmálum.

### Víðka grundarlag

Inntøkugrundarlagið hjá Landskassanum er víðkað, síðan fíggjarlógin varð samtykt, vísir Karsten Hansen á.

Tað var gjørt, tá skattalógirnar vóru til viðgerðar beint fyri jól. Eitt nú lógin um skatting av fiskiloyvum.

Hesar broytingarnar, sum samtyktar vórðu, fara at geva landskassanum fleiri møguleikar fyri at fáa eitt breiðari inntøkugrundarlag. Men samstundis skal tó roknast við, at tað ikki skal gera tær øgiliga stóru eykainntøkurnar kortini, tí vanligt fólk skal hava skattalætta í komandi ári, vísir landsstýrismaðurin á.

– Nei, tað er hvørki útgjaring ella valagn, tá boðað verður frá hesum nú, sigur hann. Tað er nakað, sum samgongan alla tíðina hevur arbeitt við.

At inntøkurnar fyrst verða samtyktar, áðrenn lættin verður givin, er bara ein øðrvísi háttur at avgreiða málið, sigur hann.

– Vanliga verður farið hinvegin. Soleiðis at fyrst verður lovað, og síðan tikið innaftur. Vit fóru bara øvugtan veg, sigur Karsten Hansen.

### Vøkstur

Seinnu árini hevur búskaparvøksturin verið eini fimm-seks prosent árliga. Men landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur ikki roknað við hesum, nú hann hevur gjørt fíggjarlóg fyri komandi ár.

Í komandi fíggjarlóg verður bert roknað við einum vøkstri upp á umleið eitt prosent, sigur Karsten Hansen, sum heldur vil vera varin enn at noyðast at koma aftur umaftur.

Yvirskotið á fíggjalógini fyri 2002 verður umleið 100 milliónir við teimum broytingum, sum gjørdar eru, síðan Karsten Hansen legði tað upprunaliga uppskotið fram.

Men so eru tað víðkaða skattagrundarlagið, sum er komið afturat, síðan fíggjarlógin varð endaliga samtykt, sum helst skuldi givið eitt sindur eyka, væntar hann.

So alt í alt roknar Karsten Hansen við, at fíggjalógin, sum hon er samtykt, fer at halda.

### Peanuts

Um ta ósemjuna, sum var millum tveir tjóðveldistingmenn beint undan jólum, tí annar hevði atkvøtt fyri einum broytingaruppskoti frá andstøðuni, sigur Karsten Hansen, at tað órógvar hann ikki.

– Hatta, sum samtykt varð uttan um fíggjarlógaruppskot okkara, var smáting. Ein hækking upp á tvær milliónir í mun til eina fíggjarlóg upp á meira enn tríggjar milliardir er peanuts, sigur hann.

Hann harmast um, at samgongumenn faa í part við andstøðuni í slíkum málum, men heldur annars ikki, at nøkur vanlukka er hend soleiðis av hesum.

Hinvegin fegnast landsstýrismaðurin við fíggjarmálum um, at tey dýru andstøðuuppskotini ikki vórðu samtykt.

### Framtíðin

Hóast seinasta fíggjarlógin hjá hesum landsstýrinum nú er samtykt, verður ikki lagt inn kortini.

Tað fyrsta, sum nú verður at gera, sigur Karsten Hansen, er at gera broytinar á pensionistaøkinum.

Korini hjá pensionistunum skulu betrast munandi, sigur hann. Arbeitt hevur verið við málinum, og beint eftir nýggjár fer uppskot at verða lagt fyri Løgtingið.

– Tað kostar sjálvandi nakað, men ikki so øgiliga nógv, sigur Karsten Hansen.

Annars verður arbeitt við automatisering av tollavgreiðsluni. Hetta skal gera alla tollavgreiðslu einfaldari, soleiðis at tað slepst undan ávísum dupultfunktiónum, sum í dag eru.

Í framtíni skulu fyritøkurnar avgreiða síni egnu tollviðurskifti, uttan at fólk hjá tollvaldinum alla tíðina situr og roknar eftir. Stakroyndir verða so tiknar til at hava eftirlit við, um rætt verður farið fram.

Hesar broytingar fara at spara munandi umsiting, sum so aftur loysir fleiri fólk á Toll- og Skattstovuni.

Tó verða tey ikki arbeiðsleys kortini, sigur Karsten Hansen, tí nýggja kolvetnisskattaskipanin skal brúka fólk, og hesi kunnu so flytast í millum uppgávur hjá sama stovni.

Tað hevur annars ljóðað, at illa hevur gingið at fingið fólk til hesi størvini, sum lýst hava verið. Men tað væntar landsstýrismaðurin fer at broytast nú.

– Tað er so nógv hent á økinum, síðan lýst varð, vísir hann á. Tann veruleiki, at olja er funnin, fer utan iva at gera starvsøkið áhugavert.